# Clinton og Bush hjálpa



Barack Obama, forseti, hevur biðið undanmenn sínar, George W. Bush og Bill Clinton, rætta Haiti eina hjálpandi hond, nú landið er meint rakt av jarðskjálvta, og báðir hava játtað. New York Times skrivar, at Obama ringdi til Bush, sum alt fyri eitt játtaði. Tað er tó ikki heilt greitt, hvør lutur hansara verður. Bill Clinton er serligur ST-umboðsmaður fyri Haiti frammanundan. Tá flóðaldan rakti Landssynningsasia í 2004, fekk Bill Clinton sín undanmann, George Bush eldra, at savna pening og aðra hjálp til tey neyðstøddu.

# Fyrsta umfar av Sement leygarkvøldið

Fyrsta innleiðandi umfarið av tónleikakappingini Sement verður leygarkvøldið 16. januar í Perluni. Bólkarnir, sum fara at kappast um at gerast "Føroya besti nýggi bólkur ella einstaklingur" eru: The Plays, Fermi, Nikolina`s Rage, Lyon, Rím og Reyp, Rebekka Petersen og Bárður Johannesen. Tiltakið byrjar kl 20 og atgongumerki á 100 kr fáast í Margarinfabrikkini, á skrivstovuni hjá Mess og við dyrnar.

# Suðuroyingar liggja væl fyri

**Suðuroyingar høvdu nóv lægstu tilboðini upp á at umvæla Strandfaraskipini Ternuna og Rituna**

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað varð greitt, tá ið tilboðini vórðu latin upp á skrivstovuni hjá Strandferðsluni á miðdegi í gjár.

Tilboðini skulu tó takast við einum ávísum fyrivarni, tí tað er so ymiskt, hvat teir ymsu tilboðsgevararnir hava roknað upp í tey tilboðini, teir hava latið inn.

Stórur áhugi var fyri arbeiðnum, tí tilboð vóru komin inn bæði frá Klaksvíkar Sleipistøð, frá MEST, frá KJ Hydraulik, frá Assens Skibsværft í Danmark og so var eitt tilboð frá einum samtaki ímillum Bærendsen Teknik á Tvøroyri og Vágs Skipasmiðju.

Strandferðslan fer nú at meta nágreiniliga um tilboðini við atliti at prísi og arbeiðstíð og so verður tikið av tí tilboðnum, sum tænir stovninum best út frá einum heildarsjónarmið.

Tað fer at taka umleið ein mánað at umvæla Rituna og tveir mánaðir at umvæla Ternuna.

Trý tilboð komu inn upp á at umvæla Rituna. Tey vóru hesi:

MEST hevði dýrasta tilboðið og bjóðaði sær til at gera arbeiðið fyri 1.324,615 krónur. Eitt samtak ímillum KJ Hydraulik og Klaksvíkar Sleipistøð bjóðaði sær at gera arbeiðið fyri 2.277,116,54 krónur og samtakið ímillum Vágs Skipasmiðju og Bærendsen teknik kundi gera arbeiðið fyri 1.120,910 krónur.

Hinvegin komu fýra tilboð inn upp á at umvæla Rituna. Klaksvíkar Sleipistøð var dýrast við 3.570,450 krónum, Assens Skibsværft kundi gera arbeiðið fyri 3.021,235 krónur, Mest bjóðaði sær at gera tað fyri 2.222,662 krónur og aftur her var samtakið ímillum Vágs Skipasmiðja og Bærendsen bíligast, tí tey kundu gera arbeiðið fyri 1.703,308 krónur.

Tað er greitt, at í tilboðnum frá suðuroyar-samtakinum er ymiskt ikki talt við, sum hinir aðrir tilboðshavarar hava við, so tað skal takast við einum ávísum fyrivarni.

Men umboð fyri samtakið ímillum Bærendsen og Vágs Skipasmiðju siga, at eftir skjóta og leyðsliga høvuðrokning, meta teir, at teir framvegis liggja væl fyri, tá ið teir eisini taka alt við, sum er við í hinum tilboðunum.



*Teir, sum góvu tilboð upp á at umvæla strandfaraskipini Ternuna og Rituna vóru spentir, tá ið tilboðini vórðu latin upp. Her standa teir og kanna tilboðini hjá hvørjum øðrum og meta um støðuna. Frá vinstru standa Mikkjal Bærendsen frá Bærendsen Teknin á Tvøroyri, Rasmus Niclasen frá MEST, Bergur Bærendsen frá Bærendsen Teknik á Tvøroyri, Hans Ziskasen frá Vágs Skipasmiðju og Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni. Tað sæst, at í fyrstu syftu í hvussu so er, eru tað suðuroyingarnir, sum hava bestu orsøkirnar til at smílast*

# Viðvíkjandi hækkan av egingjøldum fyri eldrarøkt

KUNNINGARSKRIV

*Almannamálaráðið*

Í farnu viku fóru tvey uppskot um at tálma útreiðslurnar í eldrarøktini til hoyringar. Viðgerðin av málinum hevur víst, at nøkur viðurskifti tykjast ógreið, og sum eru neyðug at lýsa neyvari.

Freistin at gera viðmerkingar til uppskotini er úti í morgin, og fer landsstýriskvinnan tá at viðgera hesar gjølla saman við Almannamálaráðnum. Síðani skal málið aftur á landsstýrisfund, har uppskotini verða viðgjørd saman við hoyringssvarum, áðrenn endalig støða verður tikin til broytingarnar, eftir ætlan fáa gildi 1. februar 2010.

Í stuttum er talan um broytingar, ið merkja, at pensjónistar koma at fáa eitt hægri egingjald fyri røkt. Broytingarnar hava fíggjarligar avleiðingar fyri pensjónistar á sambýlum og fyri heimabúgvandi pensjónistar, ið fáa heimahjálp.

**Pensjónistur á sambýli**

Pensjónistar, sum búgva á eldrasambýlum, skulu sambært ætlaðu broytingunum gjalda eitt grundgjald á 2.000 krónur um mánaðin fyri dagrøkt.

Tað merkir eitt nú, at ein stakur pensjónistur, sum ikki hevur aðra inntøku enn pensjón og samhaldsfasta framyvir kemur at gjalda 5.558 krónur um mánaðin fyri at búgva á sambýli. Fyri hetta fær pensjónisturin kost og logi, umframt alla neyðuga røkt.

Ein stakur pensjónistur, ið ikki hevur aðrar inntøkur enn pensjón og samhaldsfasta, hevur í dag eina mánaðarliga inntøku á gott 9.600 krónur eftir skatt. Hesin vil eftir ætlaðu broytingunum sostatt hava gott 4.000 krónur eftir um mánaðin til aðrar útreiðslur enn kost, logi og røkt.

**Heimabúgvandi pensjónistur**

Fyri hendan bólkin eru tvær ætlaðar broytingar. Onnur broytingin er, at tímasatsurin fyri heimahjálp verður hækkaður nakað.

Hin ætlaða broytingin er, at inntøkumarkið fyri, nær fólk skulu gjalda fyri heimahjálp, verður lækkað. Her er talan um at lækka markið fyri aðra inntøku enn pensjón og samhaldsfasta.

Í roynd og veru merkir hetta, at allir heimabúgvandi pensjónistar, ið hava inntøku yvir 9.600 krónur um mánaðin eftir skatt, skulu gjalda fyri heimahjálpina. Týdningarmikið er at undirstrika, at pensjónistar, ið ikki hava annað enn pensjónina og samhaldsfasta at liva fyri, skulu framhaldandi ikki gjalda fyri heimahjálp.

**Ongantíð gjalda meira enn 30 tímar**

Ein pensjónistur kann ongantíð gjalda meira enn fyri 30 tímar heimahjálp um mánaðin, hóast hann fær fleiri enn 30 tímar heimahjálp.